# Føroyskt oljufelag royna seg í bretsku undirgrundini

**VEÐRIÐ**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og vátaslettings- ella kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷ 1 og + 2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Ut á kvøldið minni vindur og turt. Hitalagið millum ÷ 2 og ÷ 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men út á kvøldið frískar hann vindin av eystri. Hitalagið millum ÷ 1 og ÷ 4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av norði ella av ymsum ættum og sólglottar, men okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷ 2 og ÷ 6 stig.

OLJULEITING
*Jan Müller*

Um ikki so langa tíð sleppur føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum at royna seg uttan fyri heimligu landoddarnar. Felagið, sum er við í samtakinum Faroes Partnership, saman við Amerada Hess, Dong og British Gas, er við í einum leitiloyvi á bretskum øki, tætt upp at føroyska markinum. Amerada Hess, sum er fyristøðufelag, hevur leigað boriskipið West Navion til uppgávuna. Amerada Hess skal bora tveir brunnar. Tann fyrra í teiginum, sum liggur tætt uppat loyvinum í føroyskum øki, har Hess í fjør rakti við olju og gass. Henda boringin verður í apríl, mai ella juni og er samtíðis ein metingar- og avmarkingarbrunnur fyri fundið føroysku megin markið. Helst liggur eitt møguliga stórt oljufund báðumegin markið. Hetta verður so fyrstu ferð, at eitt føroyskt oljufelag verður við í leiting uttan fyri landgrunnin.

Stutt eftir hettaskal Amerada Hess bora enn ein brunn. Hesin brunnurin er ein "explorationwell" og liggur 50 kilometrar norðan fyri Schiehallion. Brunnurin hevur fingið heitið Cambo. Føroyaska oljufelagið er tó ikki við í hesum næsta brunninum. Hjá Atlantic Petrolum er nógv virksemi í hesum døgum, nú teir skulu fyrireika seg til at vera við at bora ein brunn uttan fyri Føroyar – fyri fyrstu ferð nakrantíð.




*Stjórin í Amerada Hess Ben Arabo her saman við tveimum av undangongumonnunum í Atlantic Petroleum, Poul Mohr og Mortan Johannesen umborð á Sovereign Explorer. Um ikki so langa tíð gongur leiðin eystur um markið. Mynd Jan Müller*
***Mynd Jan Müller***

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷19 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 11 |
| Tromsø | ÷9 |
| Bergen | ÷2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | ÷7 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 9 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

**LUFTTRÝSTIÐ**




Eitt lágtrýst, 984 hPa. sunnan fyri Ísland fer móti Suður-Noreg og dýpist.




Dúpa lágtrýstið við Suður-Noreg stendur mestsum í stað og gevur høgætt við køldum veðri á okkara leiðum.

**HITALAGIÐ**




Hitalagið mált frá 20/02 kl. 06[00]– 21/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 1,2°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

**AVFALLIÐ**




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/02 kl. 06[00]– 21/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 104,2 mm

**VESTFALLSKYRRINDI**

20. februar: Fyrra kvarter
27. februar: Fyrra kvarter/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. feb | 02.05 | 14.30 | 01.05 | 13.30 | 01.20 | 13.45 | 04.05 | 16.30 | 05.05 | 17.30 | 00.20 | 12.45 | 11.45 | — | 02.20 | 14.45 | 03.20 | 15.45 | 01.50 | 14.15 | 03.05 | 15.30 |
| 23. feb | 02.56 | 15.22 | 01.56 | 14.22 | 02.11 | 14.37 | 04.56 | 17.22 | 05.56 | 18.22 | 01.11 | 13.37 | 00.11 | 12.37 | 03.11 | 15.37 | 04.11 | 16.37 | 02.41 | 15.07 | 03.56 | 16.22 |
| 24. feb | 03.49 | 16.17 | 02.49 | 15.17 | 03.04 | 15.32 | 05.49 | 18.17 | 06.49 | 19.17 | 02.04 | 14.32 | 01.04 | 13.32 | 04.04 | 16.32 | 05.04 | 17.32 | 03.34 | 16.02 | 04.49 | 17.17 |
| 25. feb | 04.45 | 17.12 | 03.45 | 16.12 | 04.00 | 16.27 | 06.45 | 19.12 | 07.45 | 20.12 | 03.00 | 15.27 | 02.00 | 14.27 | 05.00 | 17.27 | 06.00 | 18.27 | 04.30 | 16.57 | 05.45 | 18.12 |

5 707265 100050 >